# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Bjarni Hammer, løgtingsmaður

**Svarari:** Ruth Vang, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

**Evni:** Veiðugjøld

**Spurningar:**

1. Hvussu stórur partur av bruttovinninginum hava tilfeingisgjøldini verið í uppsjóvarvinnuni seinastu 10 árini - hvørt ár sær?

**Viðmerkingar:**

Tilfeingisgjøld og tøkugjøld komu inn í vinnuna fyri nøkrum árum síðani. Tað er gleðiligt fyri Føroyar, at hesar vinnur hava ment seg so mikið, at vinnurnar hava flutt seg frá at fáa stuðul til at gjalda munandi eyka upphæddir til føroyska vælferðarsamfelagið.

Tað verður nógv gitt, hvussu stórur partur hesi gjøld eru av samlaða bruttovinninginum hjá ávikavist uppsjóvarvinnuni og alivinnuni.

Hesin spurningurin verður settur fyri at fáa staðfest, hvussu stórur partur veiðugjøldini eru av bruttovinninginum.

**Á Løgtingi, 4. mai 2023**

Bjarni Hammer